## Gassverk dálkar illa

Tað er komið fram, at tað risastóra gassverkið á Melkøya í Norðurnoregi er einki minni enn ein CO2-bumba, og tað hevur fingið Erik Solheim, umhvørvisráðharra at biðja Statoil/Hydro um eina frágreiðing. Sambært reglunum kann ráðharrin ikki áleggja felagnum at skerja útlátið. Gassverkið á Melkøya hevur havt trupulleikar, sum millum annað hava havt við sær, at verkið hevur latið 1,3 millión tons meiri av CO2 út í luftina enn ætlað.





*Magni Arge, stjóri, við fylgi á veg til Stockholm, nýggja marknaðin hjá Atlantsflog. Dagin fyri hevði hann selt helvtina av sínum partabrøvum í Atlantsflog til Atlantsflog, sum rindaði 10 prosent meira enn marknaðarkursin. Landsstýrið visti einki, fyrr enn handilin var endaliga avgreiddur*

# Hol í argumentatiónini

**Danskur serfrøðingur í partabrævahandli heldur lítið um grundgevingarnar hjá nevndini í Atlantsflog fyri at keypa partabrøv frá leiðsluni fyri yvirkurs. Argumentatiónin heldur ikki, staðfestir Bjarne Jensen**

PARTABRØV
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Danski serfrøðingurin í partabrævahandli heldur lítið um, at nevndin í Atlantsflog hevur keypt egin partabrøv frá leiðsluni í fyritøkuni, og tað enntá fyri ein yvirprís á 10 prosent.

Bjarne Jensen arbeiðir sum sjálvstøðugur ráðgevi og analytikari, hann hevur millum annað verið í Føroyum og veitt ráðgeving í samband við einskiljingina av Føroya Banka, og hann fylgir sera væl við í partabrævahandlum.

Hann byggir fyrst og fremst sína serfrøði á viðurskiftini kring danska og harvið felags norðurlendska partabrævamarknaðin. Atlantsflog er fyrst og fremst knýtt at keypsskálanum í Reykjavík, og tí ynskir hann at taka fyrivarni fyri, at ymisk frávik kunnu vera frá evropeisku standardunum, sum eitt nú eru galdandi á keypsskálanum í Keypmannahavn.

Kortini keypir Bjarne Jensen ikki grundgevingarnar hjá nevnd og leiðslu í Atlantsflog fyri at handla, sum hon ger.

Christian Andreasen og Magni Arge vísa báðir á, at nevndin hevur heimild til at keypa egin partabrøv fyri ein kurs, sum víkir 10 prosent frá marknaðarkursinum.

- 10 prosents heimildin er ein formalitetur, sum til dømis allar fyritøkur á danska keypsskálinum hava í sínum viðtøkum. Endamálið við hesi viðtøku er einans at binda um heilan fingur, um so er at nógvir handlar eru á marknaðinum sama dag sum ein fyritøka keypir egin partabrøv og kursurin tí fer upp og niður. Tá kann jú vera trupult at áseta, hvat marknaðarkursurin er, og tí hava fyritøkur hesa heimild, ið kann samanberast við elastikk fyri at raka dagsins kurs. Endamálið er als ikki at nevndin í eini fyritøku kann brúka hesa heimild aktivt, slær Bjarne Jensen fast.

Danski serfrøðingurin keypir heldur ikki argumentatiónina hjá Magna Arge, sum førdi fram at leiðslan vildi selja part av sínum partabrøvum, tí hon hevði keypt fyri læntar pengar og nú var rentubyrðan støðugt meira tyngjandi fyri leiðsluna.

- Privata fíggjarstøðan hjá leiðsluni er ongantíð eitt argument fyri, at ein nevnd kann keypa egin partabrøv frá leiðsluni inn í fyritøkuna, sigur Bjarne Jensen.

Hann vísir á, at einasta endamál hjá nevndini er at umboða eigararnar og teirra ogn á besta hátt. Atlit til privat viðurskifti hjá leiðsluni eru ikki viðkomandi fyri nevndina, metir serfrøðingurin.

### Javnbjóðis møguleikar

- Heilt grundleggjandi kann man siga, at tá ein fyritøka fer á virðisbrævamarknaðin, so er tað samstundis við tí fortreyt, at øll skulu hava somu møguleikar at keypa og selja, øll skulu fáa somu viðgerð. Tí ber ikki til at nevndin fer inn og forfordeilir ávísar partaeigarar, sigur Bjarni Jensen.

Sosialurin hevur fyrrapartin verið í samband við keypsskálan í Reykjavík. Har ynskja tey í fyrstu atløgu ikki at gera viðmerkingar til handilin við partabrøvum í Atlantsflog, sum fór fram mikudagin í síðstu viku. Keypsskálin ynskir fyrst at kanna málið nærri.

tað soleiðis, at tá tú keypur og selir størri portiónir av partabrøvum í einum felag, so er tað ikki altíð ein spurningur um tann noteraða kursin á partabrævinum, sigur Christian Andreasen.

At talan í øllum føri bleiv um ein sonevndan forhandlingsspurning, váttar Magni Arge:

- Eg vurderi ikki, at eg hevði selt partabrøvini fyri kurs-219, sigur stjórin, tá hann beinleiðis veðrur spurdur um tað.

### Eingin ætlan

Vit spurdu nevndarformannin í Atlantsflog, hvat felagið ætlar at gera við tey 11.111 partabrøvini, sum felagið hevur keypt frá leiðsluni í felagnum?

- Tað er ikki nøkur støða tikin til tað enn. Vit koma møguliga at eiga tey í eina tíð. Tað er væl møguligt at vit selja partabrøvini aftur. Og also, tað er nakað, sum nevndin má avgera, tá vit koma til næsta nevndarfund í august mánaða.

*Tað vil siga at tit hava keypt 11.111 partabrøv, uttan at vita, hvat tit skulu gera við tey?*

- Ja, also... vit hava ikki nakra fasta, lidna ætlan um, hvat vit gera við partabrøvini. Men hetta er ein íløga, eins og allar aðrar íløgur. Og hon verður standandi har, til hon verður realiserað, sigur Christian Andreasen, nevndarformaður í Atlantsflog.

### Signalvirðið

Tá tað ofta verður tulkað sum ein styrki, eitt sterkt signal, at leiðslan ger íløgur í sína fyritøku, so spyrja vit stjóran í Atlantsflog, hvat signalvirðið er tá leiðslan selir út av sínum partabrøvum í fyritøkuni:

- Ja, tað mugu onnur meta av. Men hetta er gjørt í fullum opinleika, og og sambært teimum reglum, sum eru galdandi í einum børsnoteraðum felagi, sigur Magni Arge.

# Vánaligt signalvirði

**Landsstýriskvinnan í vinnumálum varð ikki kunnað um ætlanina hjá nevndini at keypa egin partabrøv fyrr enn handilin varð endaliga framdur í verki. Bjørt Samuelsen hevur nú biðið umsitingina lýsa málið út í æsir. Men sjálv harmast hon um vánaliga siglalvirði, sum partabrævasølan kann fáa fyri felagið**

PARTABRØV
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Hóast landsstýriskvinnan í vinnumálum er størsti, einstaki partaeigari í Atlantsflog og umboðar tveir triðingar av partabrøvunum í felagnum, so veit hon ikki alt.

Bjørt Samuelsen fekk onga kunning um, at nevndin í Atlantsflog arbeiddi við eini ætlan um at keypa helvtina av partabrøvunum frá ovastu leiðsluni í fyritøkuni, og tí heldur ikki at talan var um at keypa fyri ein yvirkurs á 10 prosent.

- Nei, eg visti onki. Hvørki Vinnumálaráðið ella eg sjálv fingu nakra kunning, áðrenn handilin varð endaliga avgreiddur. Eg fekk hetta at vita, eftir at handilin var farin fram, tað var mikukvøldi í síðstu viku, sigur Bjørt Samuelsen.

Harvið visti størsti, einstaki eigarin einki um hesa ætlan, fyrr enn alt varð avgreitt.

### Kannar málið

Bjørt Samuelsen hevur lítlan hug at gera ítøkiligar viðmerkingar til málið, áðrenn hon kennir tað út í æsir. Hon hevur í staðin biðið sína umsiting um at útvega allar upplýsingar í málinum og lýsa málið til fulnar.

- Umboðandi størsta meirilutaeigaran í felagnum vil eg fegin fáa lýst málið, áðrenn eg úttali meg.

Bjørt Samuelsen roknar við, at hon fær eina gjølla lýsing av málinum fyrsta dagin.

### Óheppið signalvirði

Tað eru ikki meira enn smáir sjey mánaðir síðani at landsstýrið seldi fyrsta triðingin av Atlantsflog. Tá fegnaðist táverandi landsstýrismaðurin í vinnumálum um, at leiðsla og starvsfólk ynsktu at seta pengar í felagið.

Men í dag hevur pípan sum kunnugt fingið annað ljóð, og leiðslan hevur selt helvtina av sínum partabrøvum, enntá til felagið sjálvt, og enntá fyri ein yvirkurs. Tí spyrja vit landsstýriskvinnuna, hvat hon heldur um signalvirðið í hesum:

- Tað er eingin ivi um, at signalvirðið hevði verið betri, um handilin ikki fór fram, sigur Bjørt Samuelsen.

Landsstýriskvinnan vil tó ikki gera nærri viðmerkingar, fyrr enn hon hevur fingið eina gjølla lýsing av málinum.